## Óhepnir normenn

Noreg spældi í gjárkvøldið móti griksku europameistarunum, og her endaði dysturin við 2-2 javnleiki. Noreg átti tó betri uppiborið fyri dystin, har teir stýrdu tí mesta, men tað eydnaðist teimum tó ikki at vinna dystin. Seinni um kvøldið vann Turkaland tryggan 3-0 sigur á Ungarn, og tí fóru teir framum Noreg í stríðnum um annaðplássið í bólkinum. Grikkaland er framvegis á odda.



## Málleysir finnar

Finnland og Poland spældu javnt, tá oddadysturin í bólki A var á skránni. Hóast finska yvirvág, so endaði dysturin í Helsinki málleysur, og tað kundu gestirnir avgjørt vera nøgdir um. Pólland er framvegis á odda í bólkinum við 21 stigum eftir 11 dystir. Finnland hevur 19 stig á øðrum plássi.



*Róðrarfelagið Knørrur fer um vikuskiftið at hava umboðan av átta rógvarum, tá danmarksmeistaraheitið fyri innriggarar verður á skránni.*

# Knørrafelagið til Danmarkar

**Átta rógvarar úr Róðrarfelagnum Knørri fóru í morgun til Danmarkar, har tey um vikuskiftið skulu taka lut í danmarksmeistaraskapinum fyri innriggarar**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyrr í dag fór eitt føroyskt ferðalag við rógvarum úr Róðrarfelagnum Knørri í Havnini til Danmarkar. Endamálið við túrinum hjá teimum átta rógvarunum er at taka lut í danmarksmeistaraskapinum fyri innriggarar, sum er eitt annað slag av bátum enn teir, vit eru von við í Føroyum.

Talan er um fimm menn og tríggjar kvinnur, sum fara at taka lut í kappingini, og umframt tey átta, so vera eisini ein ferðaleiðari, ein myndamaður og ein tíðindamaður við á ferðini.

Kappingin um danmarksmeistaraheitið verður hildin í lítla býnum Brabrand, sum liggur nakað uttan fyri Aarhus, og føroysku rógvararnir fara at halda til í Aarhus.

Sjálv kappingin verður á skránni leygardagin. Her skulu tær tríggjar kvinnurnar rógva undan monnunum, og teinurin hjá kvinnunum verður 1000 metrar.

Nakað eftir kvinnurnar skulu menninir kappast, og tá er talan um 2000 metrar, sum skulu leggjast afturum.

Teir átta rógvararnir, sum vera við í kappingini eru Bára Berghamar Danielsen, Eivy Olsen, Paula Eikholm, Helgi Øster Petersen, Høgni í Skorðastovu, Jacob Joensen, Jens Michal Tróndheim og Johan Jacobsen. Ferðalagið verður aftur í Føroyum seinnapartin sunnudagin.

**Rógvararnir**
**Menn:**
Helgi Øster Petersen
Høgni í Skorðastovu
Jacob Joensen
Jens Michal Tróndheim
Johan Jacobsen

**Kvinnur:**
Bára B. Danielsen
Eivy Olsen
Paula Eikholm

# Joan vann DM

**Sunnudagin vann Joan Bláfoss danska meistaraheitið í duathlon, har rennast skuldu 20 kilometrar og súkklast 60**

DUATHLON
*Tíðindaskriv:*

Kappingin var fyrsta duathlon kapping hjá Joan í næstan hálvt triðja ár, og var hetta fyrstu ferð hon skuldi royna seg í elitebólkinum og á tí langa teininum. Venjingin seinasta mánaðin hevði gingið framúr væl, og Joan hevur betrað seg bæði á súkkluni og í renningini.

### Hørð kapping

Í kvinnubólkinum vóru serliga tríggjar kvinnur, sum vónirnar vóru stórar til. Tá Joan ikki áður hevur stillað upp í elite-bólkinum í duathlon, var hon ikki millum favorittarnar. Tó skuldi tað vísa seg at longu á fyrsta rennitúrinum lá Joan millum fremstu kvinnurnar.

### Javnar inntil seinasta rennitúrin

A súkkluni var Joan støðugt við millum tær fremstu, sum ikki høvdu størvegis frástøðu fram til fremstu kvinnuna. Somikið stuttari frástøðu, at longur eftir nøkrum fáum hundrað metrum av seinna renningarteininum megnaði hon at leggja seg á odda.

Og so var "bara" at halda tørn seinastu 10 kilometrarnar. Hetta eydnaðist so eisini væl og virðiliga hjá Joan, sum kom á málið nærum tveir minuttir undan næstbesta íðkaranum.